# H.C. Andersen sjónleikur í Klaksvík

Í sambandi við H.C. Andersen árið, hevur Klaksvíkar býráð, sum er vinarbýur við føðibýin hjá H. C. Andersen, Odense, saman við Atlantis og skúlunum fingið fatur á sjónleikabólkinum H. C. Andersen Paraden, sum framførir ævintýrleikir eftir H. C. Andersen.

H. C. Andersen Paradan er ungdóms sjónleikabólkur, sum er víða gitin, og hevur havt framførslur í m.a. Kina, Hollandi, Belgia, Týsklandi og Onglandi, umframt í Danmark. Tey framføra á enskum, týskum og donskum máli.

Íklødd serliga prýðiligar búnar, sum hoyra ævintýrunum til, hava tey sermerkt seg við gjøgnumførdari skrá og hegnisligari samanseting úr flestu ævintýrunum eftir H. C. Andersen. Tónleikurin gevur eisini framførðsluni góðan ævintýrdám.

H.C. Andersen Paraden er sera nógv upptikin av framførslum víða um alt komandi ár, og kunnu tey tí bert koma til Føroyar í døgunum 3. til 6. februar 2005. Ætlanin er, at tey framføra í skúlunum í Klaksvík, har skipað verður fyri serligum H. C. Andersen døgum.

Eisini verða tey at síggja í Atlantis, SMS og møguliga í Norðurlandahúsinum.

Við í H. C. Andersen Paraduni eru 15 ungdómar og høvuðspersónurin »H. C. Andersen"« - alias Torben Iversen, sum fortelur og er bindiliðið millum teir ymisku leikirnar.

Talan er um eitt tiltak, har øll familjan kann seta sær ein stóran kross í álmanakkan, fyri ikki at gloyma at minnast til eitt ógloymandi kvøld.

Framførslur verða:
04.02.05.
kl. 09.00 Skúlin við Ósánna (bert fyri skúlan)
kl. 10.30 Skúlin á Ziskatrøð (bert fyri skúlan)
kl. 16.00 Atlantis (Almenn sýning: atgongumerki í Atlantis/Shellstøðin)
kl. 20.00 Atlantis (Almenn sýning: atgongumerki í Atlantis/Shellstøðin).

05.02.05.
kl. 11.00 SMS (eingin kostnaður)
kl. 16.00 Norðurlandahúsið (lýsur kostnaðin)

-ave-

# Klaksvíkar býráð letur neyðhjálp

**Klaksvík:**
Á býráðsfundinum týskvøldið skal Klaksvíkar Býráð taka støðu til eitt tilmæli frá fleiri nevndum um at játta íalt 30.000 kr. sum stuðul til tey, sum vórðu rakt av flóðaldumi í Asiu. Eftir áheitan frá býráðslimum hevur málið um at lata hjálp til tey, sum eru rakt av flóðalduni í Asiu, verið viðgjørt í nøkrum av nevndum býráðsins, har breið semja er um at stuðla. Samanlagt verður mælt til at játta 30.000 kr

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at býráðið allatíðina hevur havt ætlan um at veita eina upphædd í neyhjálp til vanlukkurakta økið. 30.000 krónur ljóðar kanska ikki av so nógvum, men hjá teimum, sum hava tørv á tí ger alt jú mun, sigur Steinbjørn og leggur afturat at aftanfyri uppskotið um at veita hendan stuðul liggur líka so nógv eitt ynski um at hjálpa.

Sambært kommunustýrisskipan býráðsins er tað býráðið, sum tekur endaliga støðu til játtanir av slíkum slag. Í hesum førinum eru pengarnir savnaðir í smáum upphæddum, sum eru fluttar frá ymsum játtanum á fíggjarætlan býráðsins, millum annað frá sosiala- og mentanarøkinum umframt øðrum játtanum.

-ave-

# Fýra hálkuóhapp

Hóast tað hevur verið óvanliga hált seinastu dagarnar í Klaksvík, fekk politiið bert fýra fráboðanir um smærri óhapp í stóðust av hálkuni.

Seinasta vikuskiftið var annars uppá allar mátar stak friðarligt, frætta vit av politistøðini í Klaksvík.

-ave-

# Nýggi læknastjórin fer fúsur til verka

**– Vit hava sera góð og engasjeraði starvsfólk her á Landssjúkrahúsinum, sigur Tummas í Garði, sum byrjar í starvinum sum læknastjóri í næstum**

LÆKNASTJÓRI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*– Starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum er dugnalig og engasjeraði. Tað er eitt fornøjilsi at arbeiða saman við teimum, sigur Tummas í Garði, sum er nýsettur læknastjóri*

– Eg havi arbeitt bæði í Danmark, Noregi og her í Føroyum. Út frá tí, eg havi upplivað, tori eg at siga, at vit í Føroyum hava eitt sera gott útgangsstøði til eitt gott heilsuverk. Vit hava á mangar mátar nógv meiri rutinu enn í grannalondum okkara, sigur Tummas í Garði.

Hetta við tí góða útgangsstøðinum hevur hann ikki minst upplivað í hansara dagliga arbeiði við narkosuni á Landssjúkrahúsinum.

– Ja, tað hevur, satt at siga, verið eitt fornøjilsi at arbeitt saman við teimum, sigur 46 ára gamli Tummas í Garði.

Hann er nú settur sum nýggjur læknastjóri á Landssjúkrahúsinum. Hann tekur við eftir Petur Ellefsen, sum hevur verið virkandi læknastjóri í eina tíð.

## Væl fyri fakliga

Og Tummas fer fúsur til verka á Landssjúkrahúsinum, tí hann veit at har finst ein hópur av sera engasjeraðum og góðum starvsfólkum.

– Ja, tað er mín avgjørda fatan at starvsfólkini eru sera dugnalig og eru sera væl fyri fakliga. Jú, vit hava eitt sera gott tilfeingi her á Landssjúkrahúsinum. Eingin ivi um tað, sigur Tummas.

Eitt er at hava hesa vitanina. Spurningurin er so bara, hvussu og um ein fær hildið hesa vitanina viðlíka.

– Soleiðis sum fíggjarstøðan er í landinum í dag, er ikki sannlíkt at Landssjúkrahúsið fær meiri penging. Tí kann tað koma at ganga út yvir endurútbúgvingina av starvsfólkunum. Og tað er neyvan heppið fyri nakran, um hetta støðið fer at lække í framtíðini, sigur Tummas í stuttum viðtali.

Hann dylir tí ikki fyri, at júst hetta at viðlíkahalda og menna støðið í útbúgvingini verður eitt av hansara hjartamálum sum læknastjóri.

Tummas í Garði er annars útbúgvin radiomekanikari, hann hevur verið til fiskiskap í Barentshavinum og á heimaleiðum, men fór síðani at lesa medisin í Keypmannahavn, har hann var liðugur í 1991.

Nú er hann so endaður á ovastu rók í trímannaðu leiðsluni á Landssjúkrahúsinum, saman við sjúkrahússtjóranum Poul Geert Hansen og sjúkrarøktarstjóranum Marini Vang.

# Ársins telvari veljast

5. mars fer Talvsamband Føroya at velja Ársins Telvara og Ársins Stjørnuskot 2004/2005.

TSF hevur innstillað nakrar telvarar til heiðurin, og hereftir gera feløgini av, hvør skal vinna.

Í flestu ítróttargreinunum í Føroyum verður atkvøtt um, hvør hevur havt besta avrikið í farna skeiðinum. Og nú hevur TSF so valt at ganga somu leiðir. Felagið fer í ár at velja Ársins Telvara 2004/2005 og Àrsins Stjørnuskot 2004/2005, sum fáa handað heiðursbræv og stuðul til eina talvkapping áljóðandi kr. 3.000.

Vinnararnir verða kunngjørdir í sambandi við 35-ára Jubileumskappingina hjá TSF sum verður tann 5. mars í Vestmanna.

Telvarnir sum eru innstillaðir til Ársins telvari eru (í bókstavarøð):

- Carl E. N. Samulesen
- Finnbjørn Vang
- Flóvin Tór Næs
- Hans Kristian Simonsen
- Heini Olsen
- John Rødgaard
- John Arni Nielsen
- Martin Poulsen
- Olaf Berg
- Rógvi W. Rasmussen

Ársins stjørnuskot (í bókstavarøð):

- Christoffur Dam
- Fríða við Streym
- Herborg Hansen
- Helgi D. Ziska
- Hjalti T. Jógvansson
- Høgni E. Nielsen
- Jóhan Vørmadal
- Jón Gregerssen
- Margeir Berg
- Rógvi E. Nielsen
- Rógvi Dragaberg
- Rúni Vørmadal

-ave-